## Útvarp Føroya sendir frá G!

Útvarp Føroya hevur brynja seg út til G!, og fer at senda bæði fríggjadag og leygardag av festivalinum. Talan er um tveir tímar fríggjadag, og frá kl. 19.00 leygarkvøld til eina enn ikki kunngjørda klokkutíð.

Seinnapartin fríggjadagin fer sendingin Summarleiðin at senda frá festivaløkinum frá klokkan 14:00 til 16:00. Í sendingini verður prátað við fyrireikarar, samskiparar, umframt onnur, sum hava við festivalin og festivalfyrireikingina at gera. Vertirnir verða Øssur Egholm, Kári Sólstein og Elis Poulsen.

Leygarkvøldið fer útvarpið at senda frá klokkan 19:00 og út á kvøldið beinleiðis frá G! Festival. Í sendingini verður prátað við tónleikarar, gestir, og beinleiðis tónleikur av ti stóra pallinum verður eisini at hoyra. Tað verða Elin í Stórustovu og Øssur Egholm, ið skipa fyri tí sendingini. **nud**

# Á G! er ikki so galið

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Hin stóri skemtarin, ironikarin og viðmerkjarin Jóhan í Kollafirði verður frásøgufólk á stóra pallnum á G! Festivalinum. Jóhan í Kollafirði hevur í fleiri ár verið virkin innan føroyskar fjølmiðlar. Hann var við til at stovna Atlantic Radio, og hevur í fleiri tíðarskeið starvast á Rás 2.

Hann er eitt tónlistarligt flogvit, og hevur gjørt fleiri hittløg, t.d. "Í Kollafirði er ikki so galið" og "Eg sá ein mann í Hirtshals" Jóhan var í fleiri ár ímyndin av Prix Føroyum, sum speirekandi vertur við Elvis hári og jakka í teim regluligu Prix sjónvarpssendingunum.

Tá Jóhan í Kollafirði setti á stovn nýggjan politiskan flokk, og førdi seg fram á sín sermerkta hátt undir seinasta valstríði, noyddust flest øll at taka eina støðu til Jóhan. Hin Stuttligi Flokkurin hevði óvanliga stevnuskrá og markmið. Men um ein so var fyri ella ímóti, kundi ein undir tó øllum umstøðum staðfesta, at Hin Stuttligi Flokkurin var eitt bæði frískligt og forkunnugt ískoyti til politiska kjakið. Jóhan í Kollafirði megnaði fleiri ferðir at prika við vanliga fatan, og seta tingini í perspektiv. Júst eins og ísspegilin, ið fjákaði frammanfyri kongi í gomlum døgum.

Á G! verður Jóhan í Kollafirði frásøgufólk og ísspegil, ikki fyri mætum kongum, men tó; á palli saman við mætum tónleikanøvnum! Jóhan fer at seta orð, hugløg og andlit á tað, ið fyriferst á pallinum. Tað er sostatt ein heilt serstøk uppliving, ið bíðar festivalgestunum.

# G! eigur toppin á 15 teimum bestu

G! aktuellir bólkar hava seinastu nógvu vikurnar átt toppin á almenna føroyska hittlistanum 15 tær bestu. Hetta var enn einaferð støðan í sendingini leygardagin, tá tað var almannakunngjørt, at bólkar, sum skulu spæla á G!, eiga 1., 2., 3. og 5. plássið á listanum!

Umframt hetta var eitt nýtt G! aktuelt lag var eykalag, soleiðis at møguleiki nú er fyri at nr 1,2,3,4, og 5 eru bólkar, sum skulu spæla til sama tiltak í vikuskiftinum. Bólkarnir talan er um, eru:

**Nr 1** - 200 við Muscleman Blað
**Nr 2** - Makrel við Forever and Beyond
**Nr 3** - Nephew við En Wannabe Darth Vader
**Nr 5** - Europe við Hero

og dance/techno finnarnir Beats & Styles við eykalagnum "Dynamite" sum ivaleyst verður eitt av løgunum sum Beats & Styles spæla á Gøtusandi. **nud**



Leiðari til eldraøkið

Ert tú rætti leiðarin

Tú hevur hugsanir um, hvussu eldraøkið kann mennast frameftir. Tær dámar avbjóðingar, og tú hevur evnini at leiða og motivera eitt ymisligt lið av leiðarum við ymisligum arbeiðsumstøðum.

Ljóðar hetta sum tú? So er eitt spennandi starv sum leiðari fyri eldraøkið leyst at søkja. Økið er í støðugum vøkstri, og tí krevst ein framsíggin persónur við góðum leiðaraevnum, ið setir framburð og trivnað í hásætið.

**Bygnaður og starv**
Deildin fyri eldraøkið er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Deildin fevnir í høvuðsheitum um heimarøktina og ellis- og røktarheimini. Virksemið er kring alt landið. Deildin umsitur fyri uml. 250 milliónir krónur árliga. Tað eru í løtuni uml. 845 starvsfólk innan økið, harav 455 starvast í Heimarøktini. Leiðarin arbeiðir í tøttum samstarvi við økis- og stovnsleiðarar um alt landið.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum í Heimarøktini og Serforsorgini.

Umframt deildina fyri eldraøkið eru fýra aðrar høvuðsdeildir undir Heimarøktini og Serforsorgini, og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Arbeiðsplássið er dynamiskt og umsitur eina sera týðandi samfelagsskipan. Økið hevur stóran almennan áhuga, tí tað fevnir um tænastu til nógv fólk, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanina setir.

Talan er um eitt tað størsta arbeiðsplássið í Føroyum, og tað økist, so hvørt fleiri uppgávur verða fluttar út í primeru heilsutænastuna.

**Uppgávur og krøv**
Leiðarin hevur fíggjarligu, fyrisitingarligu og fakligu ábyrgdina á øllum økinum. Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, og eingin dagur er eins.

Starvið krevur, at tú hevur viðkomandi útbúgving og hollar leiðslu- og starvsroyndir. Persónliga krevst, at tú hevur breiðan rygg og ert týðiligur. Leiðarin má eisini hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skal vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan í samstarvi við onnur.

Starvið gevur tær ávirkan, tú kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Um fleiri upplýsingar ynskjast ber til at ringja til Meginskrivstovuna á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsókn og freist**
Umsóknarfreistin er mánadagin 5. september 2005, og starvið verður sett skjótast tilber. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

Heimarøktin og Serforsorgin
Eirargarður 2, 2. hædd, Tel 304020, Fax 304010, heimser@heimarokt.fo

www.sansir.fo